# ndan á tunlinum



il meginøkið kann takast í nýtslu í mai

*Myndir: Bárður Lydersen*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, heldur røðu, meðan Dávur Reinert Hansen, stjóri, bíðar eftir sínum tørni*



*Jákup Ziskason hevði sína fyrstu reseptión undir jørð*



*Arbeiðsmenninir vóru í góðum lag, og teir feiðraðu eisini, at tunnlin varð skotin ígjøgnum*



*Jákup Joensen eigur nógvar túrar um Leirvíksfjørð við skipum hjá Strandferðsluni, og leygardagin var hann til móttøkuna, tá Norðoyatunnilin varð skotin ígjøgnum. Her fær hann sær eitt prát við Emmu Winter, fyrrverandi kommunulækna, sum fleiri ferðir hevur verið neyðsendarørindi um Leirvíksfjørð*

*Mynd: Dávur Winther*

*Leygarkvøldið vóru allir gestirnir til veitsluna í Klaksvík koyrdir um Leirvíksfjørð, og tað var ein serlig kensla hjá teimum at koma upp úr holinum í Leirvík*





*Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikasa, Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, og Kristian Fríðrik Olsen, býráðslimur við borinum, sum varð brúktir til at bora seinastu holini í tunlinum*

# Snópisligt seinasta skot

**Ein ørgrynna av fólki vóru komin til almennu móttøkuna, tá ið Norðoyatunnilin skuldi skjótast ígjøgnum, men tey fóru heimaftur við eini flatari kenslu av, at tey høvdu einki fingið við av hátíðarløtuni. Stjórin fyri Norðoyatunnilin harmast**

NORÐOYATUNNIL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fólk, sum væntaðu sær ein minnisríkan og hugnaligan dag, tá ið Norðoyatunnilin varð skotin ígjøgnum leygardagin, fóru heimaftur vónbrotin. – Vit vórðu hildin fyri gjøldur, søgdu tey mest bersøgnu eftir móttøkuna leygardagin.

Orsøkin til alt hetta var, at tann stóri almenningurin fekk einki við av seinasta skotinum, meðan tey innbodnu inni í tunlinum hoyrdu og merktu skotið, kundu klappa, hoyra røður og fáa eitt ábit.

Almenna móttøkan var í høllini, sum NCC leigar á Borðoyavík, og har bar til at fáa kaffi og okkurt afturvið. Væl omanfyri túsund fólk vóru komin á økið.

Ætlanin var, at seinasta skotið skuldi síggjast á stórskíggja, men hetta varð av ongum, og tá ið fólk so spákaðu yvir tunnilsmunnan fyri kanska at fáa okkurt við har, hendi einki, og fólk bíðaðu til fánýtis, til tey mistu tolið og fóru heimaftur.

## Teknikkurin sveik

Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunlinum, sigur, at hann er harmur um, at móttøkan skuldi spæla soleiðis av.

– Vit høvdu gjørt okkum út til, at skotið skuldi síggjast á stórskíggja, men vit fingu ikki teknikkin at rigga. Vit ætlaðu síðani, at skotið skuldi takast upp og vísast aftaná, men heldur ikki tað bar til. Tí var tað frægasta, sum vit kundu gera, at bjóða ein drekkamunn, sigur Dávur Reinert Hansen.

– Eg eri ónøgdur við, at hetta skuldi vera soleiðis, tí tað manglaði, at fólk kundu klappa fyri skotinum og líkasum siga, at hatta var tað, men viðhvørt má mann erkenna, at teknikkur ikki strekkir til, og soleiðis var tað leygardagin, sigur hann.



*Hundraðtals fólk vóru komin at fylgja seinasta skotinum í Norðoyatunlinum, men tey fingu einki við av skotinum, tí teknikkurin sveik.*

*Mynd: Dávur Winther*